## Start-venjarin situr tryggur

Ítróttarliga leiðslan í norska felagnum Start, har Todi Jónsson er ein av spælarunum, hevur fult álit á venjaranum Tom Nordlie, hóast úrslitini hjá Start higartil í ár hava verið vánalig.

– Eg havi ikki tosa um hetta við nevndina, men eg havi óavmarkað álit á Tom Nordlie. Venjarar verða sjálvsagt mettir út frá sínum úrslitum, men eg dugi ikki at síggja nakran betri venjara til okkara felag enn Tom Nordlie, sigur nevndarformaðurin í Start, Erik Solér.

Start liggur í løtuni næstniðast í tippuliguni, og sunnudagin spælir felagið á heimavølli ímóti Stabæk, sum liggur sum nummar fimm.



## Símun mátti noyðast við javnleik

Íslendska felagið Keflavík, har vágbingurin Símun Samuelsen er ein av spælarunum, spældi mikukvøldið javnt í íslendsku landskappingini. Keflavík var á vitjan hjá Grindavík, og liðini fingu eitt mál í part. Tað var Grindavík, sum byrjaði betur, og teir løgdu seg eisini á odda 1-0. Men so kom Keflavík fyri seg og javnaði. Stutt eftir hetta hevði Símun Samuelsen góða roynd, men skotið fór upp um málið. Símun spældi allan dystin í álopinum hjá Keflavík.

Skála-NSÍ 1-0 (1-0)

# Skála reisti seg úr øskuni

**Leikliga avrikið boðaði ikki frá niðurflyting, tá ið skálamenn vunnu á NSÍ, sum hevði ilt við at fáa samanspælið at rigga**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Lagið var gott á Skála sunnukvøldið. Eftir langan tronga í landskappingini og kós móti botninum, eydnaðist tað at vinna fjórðingsfinaluna í steypakappingini. Harvið hevur Skála fyri fyrstu ferð nakrantíð kvalifiserað seg at spæla hálvfinalu.

Hjá NSÍ hevur tað eftir trilvandi fyrstu umførini leingi gingið væl. Í góðveðrinum á Skála hóskvøldið var Skála leikliga omaná. Umframt 1-0 sigurin var tað ikki minni týdningarmikið hjá skálamonnum at staðfesta, at teir leikliga eru á veg móti meiri enn tí, sum sæst á støðutalvuni, og ikki minst móti meiri enn tí, sum teir vístu móti ÍF mánakvøldið.

NSÍ hevði bóltin nógv, men avrikið var vónbrot. Íblásturin var lítil, og hjá nógvum var talan um avrik væl undir tí, sum tað eigur at verða roknað við. Jústinus R. Hansen og Bogi Løkin, sum seinastu ferðirnar hava verið sentralir miðvallarar, vóru ikki millum teir fyrstu ellivu. Tað varð betri, tá ið Jústinus R. Hansen beinanvegin eftir steðgin varð settur á sentralt pláss, men NSÍ varð ongantíð rættulig hóttan.

Einasta málið fekk heimaliðið beinanvegin. Bólturin varð stungin fram ímillum. Levi Hanssen megnaði at halda Pól Thorsteinsson so mikið aftanfyri seg, at bólturin kundi stikla eina ferð, áðrenn ungi maðurin smekkaði til úr átjan metrum, og tað sang í meskunum aftanfyri Jens Martin Knudsen.

Levi hevur ikki spælt so nógv higartil í ár. Eftir lítlu úrtøkuna í landskappingini hevði Johan Nielsen umskipað Skála liðið. Bogi Gregersen, sum fleiri ferðir ikki hevur verið serliga skarpur frammanfyri mótstøðumálinum, var á beinkinum. Levi loysti av, og hann taðaði væl fyri sær sjálvum. Í vinstra verjuborði var Arnholdt Berg, sum leingi hevur verið skaddur, og í vinstra borði á miðvøllinum stríddist Debus Danielsen sera væl.

Størst týdning av øllum hevði tað fyri Skála og dystargongdina og úrslitið, at liðformaðurin hjá Skála, Pauli G. Hansen, eftir langan skaðasteðg var aftur á sentrala miðvallarplássinum. Hann var eyðsýndasti spælarin av øllum.



*Eftir at hava verið sigursleysir í heilan mánað, eydnaðist tað hóskvøldið Skála at koppa NSÍ – og harvið tryggja sær atgongd til hálvfinaluna í steypakappingini*

*savnsmynd*

Pauli bakkaði upp í verjupartinum, fangaði eina rúgvu, megnaði at halda upp á bóltin og spæla skilagott runt og eisini at leggja frambrættaðar sendingar og ikki minst at stýra viðspælarunum.

Í 1. hálvleiki hevði Christian Høgni Jacobsen, sum aftur hesa ferð hevði vánaligar treytir at arbeiða undir, góðan fluktara eftir innkast, men Vlada Filipovic bjargaði. Eftir steðgin fluktaði Óli Hansen eftir frísparksframlegging, men bólturin fór væl upp um málið.

Fimm minuttir undan steðginum var Jónhard Frederiksberg tætt við at gera mál, men Jens Martin bjargaði til horna. Tá ið tað restaðu tólv minuttir, drønstútaði Pætur Dam Jacobsen í tvørtræið eftir hornasparksinnlegg úr vinstru. Bólturin støkk í svørðin og aftur í spæl. Harvið helt spenningurin sær inntil síðsta bríksl hjá framúr skilagóða Peturi Reinert.

Skála spældi seg í hálvfinaluna, og avrikið boðar frá meiri í landskappingini. B liðið, sum teir í Runavíkar kommunu skemta við, knockoutaði B liðið!

## Nógv meira enn rasarakoyring

**Formil 1 koyringin í Monako er tann mest víðagitna koyringin á kappingarárinum, men hon er eisini nógv meiri enn ein kappkoyring. Hetta er savningar depilin fyri kend og rík fólk úr øllum heiminum.**

**Monako Grand Prix er stutt sagt eitt marglætis paradís.**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hetta vikuskiftið verður tann mest klassiska av øllum formul 1 koyringum koyrd í Monako. Tað er í Monako, at liðini bjóða sínum høvuðsstuðlum á vitjan, og tað er í Monako, at høvuðsstuðlarnir bjóða øllum teimum ríku og kendu á vitjan.

Brasiliumaðurin Senna vann koyringina í Monako seks ferðir, hetta er met – eitt av teimum fáu metunum, ið Senna enn hevur. Men sjeyfaldi heimsmeistarin Michael Schumacher kann við einum sigri hetta vikuskiftið, koma ájavnt við Senna.

Men at døma eftir royndarkoyringini í gjár, so eru útlitini fyri hesum ikki tey allar bestu. Tí Ferrari vóru óvanliga veikir. Michael Schumacher megnaði einans at koyra 15. skjótastu tíðina, meðan Ferrari liðfelagin Felipe Massa fekk 10. pláss.

Triði koyrarin í Williams-Cosworth, Alexander Wurz var skjótastur í royndarkoyringini. Hann koyrdi skjótasta umfarið við fáum sekundum eftir at koyra, hetta eftir at triði koyrarin hjá Honda, Anthony Davidson, ið hevði ligið fremstur, rendi á og misti eitt hjól.

Fremsti maður í kappingini um heimsmeistaraheitið Fernando Alonso koyrdi 4. skjótasta umfarið í sínum Renault. Meðan vinnarin frá 2002 Juan Pablo Montoya varð 3. skjótastur.